


**Poul Hansen hevur fingið nýggja kantinu, sum Una'sa fólk hava málað**



**Skemtast við íslendingarnar, sum arbeiða fyri Una á Hotel Føroyum**



**Slappar av eina løtu í stólinum í Clinton Suituni, sum Una'sa fólk eisini hava málað**



**Jesar er skjótur at geva Una tímaseðilin, tá teir hittast**

*Framhald av síðu 4*

## »Er for lítið at gera, ber ikki til at arbeiða tað av tær.«

*Uni Zachariasen, málarameistari*

arbeiða ótarnað, fortelur Uni og leggur afturat, at hann fyrr – tá virkið hevði eini 10 fólk, onkutíð tók eina hond við í vanliga málara-arbeiðinum, men tað hendir ikki so nógv longur.

– Um summarið, tá vit hava mest at gera, verið eg noyddur at taka eina eyka hond við, til dømis tá vit skulu seta stilladsir upp og annað, men ta mesta av tíðini fer við at koyra runt millum arbeiðini og málingahandlarnar og annars vera úti um meg við at geva tilboð, greiðir Uni frá.

Eftir at hava sæð bæði móttøkuna hjá grannskoðarunum SPEKT og nýggju kantinuna hjá heilsøluni Poul Hansen, sum Una'sa fólk hava gjært, verður leiðin sett niðan á Hotel Føroyar. Har er umleið helvtin av fólkunum hjá Una í gongd í løtuni við at gera ein heilan vong av kømurum lidnan til háárstíðina.

– Arbeiðið á Hotel Føroyum, sum vit hava verið partur av, síðani nýggi stjórin fór í gongd við stóru umbyggingina, er eitt spennandi job. Har verður hugsað um hvørja detalju, og tá krøvini eru so høg og úrslitini so góð, so smittar tað eisini av upp á arbeiðsgleðini, sigur Uni og fær eitt fjart smílandi brá yvir seg.

– Hann dugir ótrúliga væl, leggur málarameistarin afturat, nærum innantanna.

Eg ivist eina løtu í, um hann meinar við stjóran á Hotel Føroyum ella seg sjálvan, men tað kann í veruleikanum gera tað sama, tí báðir eru teir sera dugnaligir.

### Stikkpillarar

Eftir at hava heilsað upp á nakrar av íslendingunum, sum arbeiða fyri Una uppi á hotellinum við Oyggjarvegin, gongur leiðin út á Argir. Íslendingarnir á hotellinum vóru skemtiligir, og sóu út til at trívast. Teir prátaðu háIv-føroyskt longu, sjálvt um teir bara hava verið her nakrar mánaðir, og sjálvt um tú kendi á teimum, at teir hava stóra virðing fyri stjóranum, so komu eisini onkrir stikkpillarar, so sum tað er vanligt í bæði hesum og øðrum handaligum umhvørvum. Og Uni stakk afturímóti.

Á veg inn í fyrsta raðhúsið Undir Kongavarða, hitta vit enn ein íslending.

– Hasin fer aftur til Íslands nú. Hann hevur fingið arbeiði, fortelur Uni og smílist um alt andlitið.

Málarameistarin hevur einki ímóti at missa hendan góða mann, tí hann er í Føroyum einsamallur, meðan kona og børn eru í Íslandi. Hann hevur trivist væl í Føroyum, men longst illa, so væl at Una, tá eg spyrji hvussu hann er at arbeiða hjá. Sjálvt um mann kanska eigur at siga okkurt gott um arbeiðsgevara sín, tá hann hoyrir hvørt orð, so tykjast teir at vera erligir, tá teir rósa honum. Tú sært tað í eygunum á teimum, at teir bæði hava virðing fyri Una, samstundis sum teimum dáma at verða í hansara selskapi.

Uni er spentur upp á byggiætlanina undir Kongavarða, og tað er eisini ein góður kjansur, sum hann hevur vunnið sær her. Hann var eina hálva millión krónur lægri enn næstlægsti, tá tilboðini vóru komin inn, men tað skal nokk ganga.

– Eg haldi ikki at mítt tilboð var for lágt, og gongur alt nøkulunda, sum tað skal, so fari eg at fáa eitt oyra burturúr her eisini, sigur hann.

Á veg oman í býin aftur, spyrji eg Una, um hann hevur hugsað



**Útsýnið frá einum av raðhúsunum undir Kongavarða**

### Málingalív

Jesar, sum hevur arbeitt í 23 ár hjá Una, og Pauli, sum er arbeiðsformaður, eru í raðhúsinum undir Kongavarða, og teir lata tað eru tí gleðiboð fyri bæði íslendingin og Una, at hann nú skal til Íslands aftur at arbeiða.

Inni í húsinum í »Valby«, sum eg havi hoyrt onkran rópa bygg-ingina undir Kongavarða, er ótrúliga gott útsýnið. Eg havi glett meg allan seinnapartin til at sleppa at vitja her, og nú vit standa og hyggja út yvir Argir og Havnina, eri eg ikki skuffaður. Tað er klárt í veðrinum, og tað minnir mest av øllum um ein av hesum túrinum við Atlantsflog, tá flogskiparin ger av at fara ein lítlan »sight-seeing-túr« inn yvir Havnina, áðrenn lent verður í Vágum. Fantastiskt.

um framtíðini, sjálvt um hann bara er hálva øld gamal. Hann svarar beinanvegin »ja«, men drálar so eitt sindur. Kanska er hann ikki komin til sættis við sær sjálvum um hesa tíð, tó at hann hevur hugsað. Og tað er akkurát tað, sum tað er.

– Eg havi hugsað nógv um framtíðina, men eg endi altíð við at koma til ta niðurstøðu, at eg vil halda áfram sum nú. Máling er mítt lív, og eg elski hetta lívið. Um eg missi málingalívið, so missi eg mín samleika, haldi eg, sigur hann og verður aftur eitt lítið sindur fjarur.

– Kanska endar tað við, at Hanus (sonurin, blaðm.) tekur yvir, og so kann eg bara arbeiða hjá honum, leggur hann síðani afturat.

*Leif Láadal*